# Hava gjørt góðan handil

**Forstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar heldur, at Tryggingarfelagið hevur gjørt ein góðan handil, tá tað keypti Hotel Føroyar. Hotellið er leigað út aftur til gomlu eigararnar**



*Hotel Føroyar varð um jólini selt sum liður í bjargingarætlan hjá Smyril Line. Ein av stóru partaeigarunum í Smyril Line, Tryggingarfelagið Føroyar, keypti umvegis eitt partafelag, sum tryggingin eigur, hotellið og vllaraheimið við Oyggjarvegin, og leigaði tey beinanveg aftur til teirra, sum keypt varð frá*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

HOTELSØLA
*Edvard Joensen*

Partafelagð Ognir, sum Tryggingarfelagið Føroyar eigur, hevur keypt Hotel Føroyar frá Smyril Line. Felagið hevur leigað hotellið út aftur til gomlu eigararnar at reka. Forstjórin í Tryggingarfelagnum heldur, at felagið hevur gjørt ein góðan handil.

Enn einaferð hevur Hotel Føroyar skift eigara. Hesaferð, var tað Smyril Line, sum seldi, og beint eftir søluna leigaði hotellið aftur frá nýggju eigarunum, sum er eitt felag, sum Tryggingarfelagið Føroyar eigur, alt sum tað er.

Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum, sigur, at hann metir, at Tryggingarfelagið hevur gjørt ein góðan handil. Hann vil ikki upplýsa neyva keypsprísin, men váttar, at hann liggur um tær 60 milliónirnar, sum nevndar hava verið.

– Hetta merkir ikki, at eg nú skal vera hotelstjóri, sigur Gunnar í Liða. Raksturin av hotellinum fer at halda fram óbroyttur, sigur hann, tí Partafelagið Ognir hevur longu leigað hotellið út aftur til teirra, sum fyrr áttu tað. Nevniliga eitt felag hjá Smyril Line.

Forstjórin í Tryggingarfelagnum heldur ikki, at ein keypsprísur upp á 60 milliónir er ov høgur fyri Hotel Føroyar og vallaraheimið, sum er granni hjá hotellinum, í einum samlaðum handli.

– Vit hava kannað rakstrartølini hjá hotellinum og vallaraheiminum, og vit halda okkum hava gjørt eina forrætning, har vit fáa góða rentu aftur fyri pengarnar. Hotellið hevur verið væl rikið og hevur havt góð úrslit seinnu árini, og tað vænta vit eisini í framtíðini sigur hann.

Gunnar í Liða sigur seg hava ta fatan, at Tryggingarfelagið Føroyar var ikki einsamalt at vísa áhuga fyri Hotel Føroyum. Onkur annar lá eisini framvið, sigur hann seg hava frænir av, men vil ikki siga nakað um, hvør tað hevur verið.

Hann vísir aftur, at handilin av Hotel Føroyum skal hava verið ein pappírsflyting av virðum hjá Smyril Line til ein av stóru partaeigarunum í felagnum fyri tann vegin at bøta um tølini hjá Smyril Line, sum soleiðis kundi ganga krøvunum hjá fíggingarstovnunum, sum fíggjar Norrönu, á møti.

– Tað er einki odiøst í hesum handlinum, staðfestir Gunnar í Liða. Her er talan um reinar »menniskjapengar«.

– Men tað er einki dulsmál, at Smyril Line varð noytt at selja hotellið fyri at bjarga Norrönu, váttar hann.

# Nýtt sambýli til sinnisveik

**Almanna- og Heilsumálaráðið hevur keypt enn eini sethús í Sandavági til sambýli fyri sinnisveik. Húsini eru í grannalagnum, har verandi sambýli fyri sinnisveik er**

SAMBÝLI
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Enn eini sethús í Sandavági eru keypt til sambýli fyri sinnisveik í grannalagnum, har verandi sambýli Undir Fobbakletti longu er.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, váttar, at húsini vórðu keypt tollaksmessudag, og at keypsprísurin er 1,9 millión krónur. Hetta svarar til metingarprísin, sigur landsstýrismaðurin.

Grundin til at enn eini hús í Sandavági eru keypt til sambýli, er tann einfalda, at her fekst mest fyri pengarnar, sigur landsstýrismaðurin. Tað, at húsini at kalla eru grannahús við verandi sambýli ger, at til ber at reka tey undir einum. Soleiðis skilja, at tey vera undir sama leiðara, og at tað í ávísan mun eisini ber til at brúka somu starvsfólk í báðum húsunum. Eitt nú náttarvaktirnar, vísir landsstýrismaðurin á.

– Vit fáa ein nógv bíligari rakstur á hendan hátt. Her hava vit tvær smáar búeindir, men samstundis ein størri stovn, sigur Hans Pauli Strøm. Vit hava fingið tvær flugur fyri eitt slag. Her fáa vit nógv meira burtur úr færri krónum, enn neyðugt hevði verið at nýtt, um vit skuldu keypt eini hús aðrastaðni, sigur hann.

Tað praktiska í samband við nýggja sambýlið er ikki komið uppá pláss enn. Eitt nú, hvussu nógv búfólk fara at búgva í húsinum, hvussu nógv starvsfólk neyðugt verður at seta í starv, og nær latið verður upp. Tey málini verða avgreidd sum skjótast, sigur landsstýrismaðurin.



*Nýggja sambýlið fyri sinnisveik í Sandavági, liggur væl fyri við góðum útsýni*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Góðir møguleikar eru at gera tað hugnaligt hjá búfólkunum í sera góða sólarganginum við Traðarvegin í Sandavági*

*Mynd: Edvard Joensen*